## Fleiri ferðafólk

Ferðafólkatalið um flogvøllin í Vágum veksur støðugt. Í november fóru 12.541 ferðafólk um flogvøllin, og tað er 13,4% fleiri enn í novembur í fjør, tá ferðafólkatalið var 11.060. Frá januar til november hava195.627 fólk ferðast um flogvøllin, og tað er 14,8% fleiri enn sama tíðarskeið í fjør, tá talið var 170.467. Talið á flogførum veksur eisini. Higartil í ár eru 6.166 flogfør komin og farin ella 18,3% fleiri enn sama mánaðir í fjør.

## Selja ov seint

Tað er alt ov seint at selja fisk kl. 10 fyrrapartin, soleiðis sum Fiskamarknaður Føroya ger. Tað sigur Birgir Kass á Faroe Seafood í Grimsby við Vinnuvitan. Hann vísir á, at viðhvørt verður sølan so drúgv, at hon er ikki liðug fyrr enn kl. 14, og tað ber í sær, at virkini fáa ikki fiskin fyrr enn kanska kl. 17, og tá er ov seint at skera fløk, sum skulu av landinum við einum farmaskipi kl. 20. Sølan eigur at byrja kl. 6 um morgunin, heldur hann.

# Lágt felli og góð vekt tryggja

**Alivinnan er við at koma fyri seg aftur, hóast fortreytirnar á mangar mátar eru øðrvísi í dag. - Okkara uppgáva í framtíðini verður at framleiða hvørt kilo av laksi so bíligt sum gjørligt, sigur rakstrarleiðarin hjá Pan Fish í Oyndarfirði, Marnar Dam**




*Alivinna krevur nógva útgerð. Eftir at hava ligið meiri og minni bakk, er nú vend við at koma í*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ALING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Oyndarfjørður:** Hugaligt er at koyra til Oyndarfjarðar henda týsdagin, hóast veðrið ikki er av tí allarbesta. Greið tekin eru um vinnuligt virksemi slepst ikki undan tí vakna eyganum.

Áðrenn ein kemur til bygdina liggur ein alistøð, og úti á sjálvum fjørðinum síggjast fleiri aliringar klárir til enn eina útseting av laksasmolti.

Inni í havnarlagnum er ikki nógv fólk at síggja, men í einum staði sæst farvegurin eftir virksemi sum er knýtt at alingini - ringar, slangur, rør og ein alibátur. Og ein trukkur sum koyrir aftur og fram innanfyri girðingina hjá Pan Fish í bygdini. Her er veruliga lív í.

Inni á virkinum hitta vit rakstrarleiðaran, Marnar Dam. Og hann kann bara staðfesta tað sama, sum vit longu hava fingið eygu á:

Alivinnan er við at koma fyri seg aftur. Fyri júst 14 døgum síðani tóku teir fyrsta ILA-fría laksin í hesi øldini, og grundarlag er lagt fyri skynsomum arbeiði í framtíðini.

- Jú, vit síggja ljóst uppá framtíðina, sigur Marnar Dam við Sosialin.

Hann er tó greiður um, at hóast ein rekur skynsama alivinnu á sjógvi og landi í Føroyum, so hevur ein kortini ikki nakra ávirkan á prísin, sum fæst í útlondum fyri tann alda laksin.

- Nei, hann fáa vit so einki gjørt við. Tað einasta vit kunnu gera nakað við, er at framleiða hvørt kilo av laksi so bíligt sum gjørligt, sigur Marner.

*Vit hava nú lagt eitt gott grundarlag fyri framtíðina. Og vit miða tí eftir at seta meiri laks út á vári komandi ár*

### Vend er komin í

Eingin ivi man vera um, at alingin hevur verið fyri bakkasti og í hørðum sjógvi tey seinastu mongu árini. Nú vísir tað seg kortini, sum um henda vinnan er við at koma fyri seg aftur.

Pan Fish í Oyndarfirði er eitt gott dømi um at gongdin er við at venda positiva vegin - og í roynd og veru vendist rættiliga skjótt, bert fá ár eftir at herviliga ILA-sjúkan varð staðfest, gjørdi rættiliga um seg og legði alivinnuna í oyði.

Hjá Pan fish í Oyndarfirði var støðan soleiðis, at teir vóru lidnir at taka allan alifiskin upp í mars mánaði 2004.

Tann stóri spurningurin tá var, hvussu fór at verða í framtíðini:

Vóru nøkur líkindi fyri, at alivinnan kundi aftur fara at vinda uppá seg aftur?

Og var nakar møguleiki

## Skynsamt og spakuliga

Tá Marnar hyggur inn í komandi árið so ivast hann ikki eina løtu í, at tað arbeiðið sum higartil er gjørt, hevur ikki verið til fánýtis.

- Vit hava nú lagt eitt gott grundarlag fyri framtíðina. Og vit miða tí eftir at seta meiri laks út á vári komandi ár, sigur hann.

Ætlanin er ikki seta sær ov høg mál beinanvegin, men laga seg eftir tørvinum.

Í fjør settu teir 550.000 smolt út, og ætla at hækka hetta talið spakuliga til 700.000 í 2007.

Teir kundu uttan iva sett meiri út, helst dupult so nógv, men teir ynskja at fara varliga og skynsamliga fram. Tí verður talið vaksið heldur spakuliga, heldur enn í einum risalopi.

- Jú, vit síggja ljóst uppá framtíðina. Vit eru allatíðina uppá forkant við menningini, og eru tí til reiðar til tær avbjóðingarnar sum framtíðin fer at geva okkum.